## Krevja nýskipanir

Bretski forsætisráðharrin, Gordon Brown, og franski forsetin, Nicolas Sarkozy, skriva í einari grein í New York Times, at tað er neyðugt við heimsumfatandi nýskipanum á fíggjarmarknaðinum. Teir báðir siga tað vera neyðugt við betri altjóða eftirliti við tí váðafúsa partinum av fíggjarmarknaðinum, so bankarnir ikki kunnu fjala sítt virksemi í londum, sum einki eftirlit hava. Gordon Brown og Nicolas Sarkozy eru eisini á einum máli um, at bankarnir skulu rinda skatt av tí, sum teir lata sínum stjórum sum bonus. Eitt uppskot um hetta seinasta er longu lagt fyri bretska Parlamentið.



## Tað var al-Qaeda

Ein felagsskapur við tilknýti til al-Qaida hevur nú átikið sær ábyrgdina av teimum ógvusligu bumbuspreingingunum, sum kravdu 127 mannalív í irakska høvuðsstaðnum Bagdad fyrradagin. Meiri enn 500 fólk vórðu særd. Felagsskapurin, ið nevnir seg Islamski Staturin Irak, skrivar á einari heimasíðu, at hann hevur sett sær fyri at toga ta iraksku stjórnina upp við rót, og at hann hevur ætlanir um álop á fleiri mál afturat. Iraksku myndugleikarnir siga, at felagsskapurin hevur fyrr átikið sær ábyrgdina av atsóknum at almennum bygningum í Bagdad.

# - Vit hava fingið eina góða loysn

**Útróðrarmenn í Sandoynni eru sera fegnir um nýggju skipanina við avreiðing sum merkir, at teimum ikki longur nýtist at sigla til marknaðin við fiskinum, ei heldur nýtist teimum at koyra longu leiðina inn á fiskamarknaðin á Toftum við veiðini**

ÚTRÓÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í eina tíð hava útróðrarmenn í Sandoynni havt eina lagaligari og høgligari avreiðingarskipan, enn teir annars hava havt seinastu árini.

Nú tekur Sandoy Seafood sær av, at menn kunnu goyma fiskin á báðum virkjunum í oynni, til hann fer í traila á gólvsøluna í Sørvági.

Síðan virkini í Sandoynni góvust at keypa útróðrarfisk, hava útróðrarmenn sjálvir verið noyddir at sigla til marknaðin við fiskinum - og í aðrar mátar noyddust teir longu leiðina í bili úr Sandoynni og inn á fiskamarknaðin á Toftum við fiskinum.

### Góð skipan

Richard Hentze, útróðrarmaður á Sandi, sigur, at tað mangan kundi taka einar seks tímar frá tí, at teir góvust at fiska, til teir høvdu verið í Miðvági við fiskinum og vóru komnir heimaftur til Sands.

- Koyrdu vit hinvegin fiskin inn á Toftir, reyk ein heilur útróðrardagur.

Hann sigur, at skipanin nú er hon, at tá fiskurin er komin upp á bryggjuna á Sandi ella í Skopun, eru teir púrasta leysir av honum.

- Fólk hjá Sandoy Seafood taka sær av koyringini inn á virkið og ísingini. Tá bilur so kemur úr Sørvági við upsa til virkingar í Sandoynni, taka teir fiskin norður við aftur. Fiskurin verður síðan seldur á gólvinum í Sørvági um uppboðssøluna hjá Fiskamarknaði Føroya, sigur útróðrarmaðurin.



*- Væl av fiski hevur verið at fingið í heyst. Hetta er besta árið til tosk í nøkur ár, sigur Richard Hentze, útróðrarmaður, sum hevur ein útróðrarbát av slagnum AWI 35*
*- Men fiskurin hevur verið smáttfallandi, leggur Richard Hentze, útróðrarmaður, aftrat*

### Spara tíð

Richard Hentze sigur, at allir útróðrarmenn í Sandoynni eru sera fegnir um hesa skipan, sum teir gjalda 70 oyru fyri av hvørjum kilo. Eini 30 oyru fara til Sandoy Seafood, og hini 40 oyruni til flutning.

- Hetta eru vit væl nøgdir við, tí hetta er umleið sami kostnaður, sum vit rindaðu fyri sjálvir at koyra inn á Toftir við fiskinum. Henda skipan lættir nógv um hjá okkum og ger, at okkum nýtist ikki at missa nakran útróðrardag, ei heldur egningardag.

Richard Hentze sigur annars, at væl av fiski hevur verið at fingið í heyst, og hann heldur, at hetta er besta árið til tosk í nøkur ár.

Á seinasta útróðrartúri setti hann 16 stampar og fekk 2.200 pund, meginparturin toskur.

# Sandoy Seafood virkar portiónir úr upsa

**Eysturbúgvin hevur landað á Sandi, og í vikuni hevur Sandoy Seafood eisini keypt fisk úr Sørvági**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin landaði Eysturbúgvin á Sandi. Teir høvdu 135.000 pund av upsa, sum Sandoy Seafood keypti.

Eysturbúgvin partrolar saman við Vesturbúgvanum, sum landaði umleið somu nøgd í Vestmanna.

Skipini fóru útaftur longu mánakvøldið.

Hesa vikuna hevur Sandoy Seafood eisini keypt 90.000 pund av upsa úr Sørvági. Hetta er fiskur, sum partrolararnir Vesturskin og Vesturleiki landaðu í Sørvági mánadagin.

### Virka portiónir

Á virkinum í Skopun fer meginparturin av fiskinum til portiónir og tað, sum ikki fer til portiónir, fer í blokk.

Tað eru eini 4-5 ár síðan, at Sandoy Seafood legði um frá blokki til portiónir, sum geva meiri arbeiði, samstundis sum virðisøkingin av ráfiskinum er størri.

Sandoy Seafood í Skopun hevur framleiðsluorku til eini 25-30 tons av ráfiski um dagin.

### Landa á Sandi

Á virkinum á Sandi, har felagið áður hevði saltfiskaframleiðslu, er bara virksemi, tá landing er. Tey størru skipini landa á Sandi, og síðan verður fiskurin koyrdur norður til Skopunar, har hann verður virkaður.

Sum er, verður virkið á Sandi ikki latið uppaftur til saltfiskaframleiðslu, siga tey á Sandoy Seafood, sum annars hevur eini 60 fólk á sínum lønarlista.



*Eysturbúgvin er trúgvur móti Sandoy Seafood og hevur gjøgnum árini lagt nógvar ísfiskalastir upp til virkingar í Sandoynni*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*